Juni 2021

betri trygging

Tryggingartreytir

# *Sethúsatrygging – sumtrygging*

# Sethúsatrygging – sumtrygging


## A. Lógargrundarlag 3

## B. Felagstreytir 3

10.00 Hvør er tryggjaður? 3
11.00 Eigaraskifti 3
12.00 Tryggingarstaður 3

## C. Tryggjaðir lutir 3

13.00 Tryggingin fevnir um 3
14.00 Bygningar í gerð 4

## D. Skaðaorsøkir 4

20.00 Eldur 4
21.00 Tilsóting 4
22.00 Turrkóking 4
23.00 Eksplosjón 4
24.00 Spreinging av dampketlum og trýstkókarum 4
25.00 Beinleiðis torusláttur 4
26.00 Niðurdottin flogfør 4
27.00 Fylgiútreiðslur 4
28.00 El-skaði 4
30.00 Útstreyming av vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl. 5
35.00 Víðkað rør- og kaðaltrygging 5
40.00 Frostspreinging 5
50.00 Stormur 6
60.00 Omanlop, áarlop og glopraregn/toybil 6
70.00 Tjóvarí og herverk 6

## E. Felagstreytir fyri C og D 7

80.00 Upprudding 7
90.00 Skaðauppgerð 7
100.00 Tryggingarvirði 9
110.00 Yvirtrygging 9
120.00 Undirtrygging 9
130.00 Endurgjald til afturgerð 9
131.00 Bygningar/bygningslutir ætlaðir at ríva niður 9
132.00 Bygningar, ið standa mannleysir 9
133.00 Bygging uttanfyri verandi grund 9
140.00 Kontant endurgjald 9

## F. Tilvalstryggingar 10

150.00 Glastrygging 10

## G. Vanligar reglur 10

220.00 Tryggingargjøld v.m. 10
221.00 Sjálvábyrgd 10
222.00 Prístalsjavning 10
230.00 Tíðarskeið og uppsøgn 11
235.00 Angringarrættur 11
240.00 Uppsøgn aftaná skaða 11
250.00 Broytingar av gjaldskránni og tryggingartreytunum 11
260.00 Tá tryggingin verður teknað 11
270.00 Vandabroytingar og flyting 11
280.00 Eigaraskifti 12
290.00 Trygdarásetingar 12
300.00 Kríggj, náttúruvanlukkur o.tl. 12
310.00 Viðlíkahald v.m. 12
320.00 Eftirlit 12
330.00 Skaði, sum tann tryggjaði er atvoldin til við vilja ella í gáloysni 12
340.00 Dupulttrygging 12
350.00 Hvussu verður boðað frá skaða? 13
360.00 Bjarging og varðveitsla 13
370.00 Ósemjur 13
371.00 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging 13
372.00 Kærunevnd 13
373.00 Yvirsýn 14

betri trygging

# Sethúsatrygging – sumtrygging

## A. Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt hesar tryggingartreytir, møguligar sertreytir í tryggingarskjalinum og viðtøkur felagsins, tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi.

## B. Felagstreytir

**10.00 Hvør er tryggjaður?**
**10.01** Tryggingin fevnir um tryggingartakaran, annaðhvørt hann eigur ella brúkar ognina, umframt onnur sum sambært galdandi lóggávu eru tryggjað.

**11.00 Eigaraskifti**
**11.01** Skiftir ognin eigara, skal Betri Trygging hava skrivlig boð um hetta beinanvegin.

**11.02** Tann nýggi eigarin er tryggjaður, til nýggj trygging er teknað, tó í longsta lagi 4 vikur frá yvirtøkudegi. Er nevnda fráboðan ikki latin innan nevndu freist, er tryggingin burturdottin.

**12.00 Tryggingarstaður**
Bygningstryggingin fevnir um ognina á tí tryggingarstaði, sum nevnt er í tryggingarskjalinum. (Matr.nr.)

## C. Tryggjaðir lutir

**13.00 Tryggingin fevnir um**
**13.01** Teir bygningar, ið standa á tryggingarstaðnum, og sum nevndir eru í tryggingarskjalinum, við undirstøði niður til 1 metur undir jørð ella 1 metur undir kjallaragólv.

**13.02** Uttan nærri tilskiling í tryggingarskjalinum fevnir tryggingin um fast bygningstilhoyr, fastar bygningslutir og innleggingar:

Tryggingin fevnir tó ikki um hitapottar og markisur. Kann tó tryggjast serskilt.

**a)** El-innleggingar íroknað stikkleiðingar og høvuðstalvur, orku- og ljósinnleggingar íroknað tilhoyrandi útbúnað, elhúsarhaldstól, so sum køliskáp, frystiboks, komfýr, vaski-, turki- og uppvaskimaskinu.

**Undantøk og avmarkingar**
(1. Tó ikki ljósrør, perur og sikringar).

**b)** Innleggingar íroknað stikkleiðingar til telefon og antennur.

**c)** Innleggingar við tilhoyri til gass, upphiting og útlufting.

**d)** Rørútbúnað, ið leiðir vatn til bygningin, og rørútbúnað, ið leiðir frárenningarvatn frá bygninginum. Tryggingin fevnir eisini um lok til rottangar.

**e)** Rørútbúnað, ið er liður í innandura vatn-, heilsu-/reinføris- og frárenningarútbúnaðinum í einum bygningi og wc-kummur, sisternur, handvøsk, bidet og baðikør, miðstøðuhita- og heittvatnsútbúnað líkaleiðis ketlar, ið hartil hoyra, tangar, pumpur, mátarar og grundvatnspumpur.

**f)** Fasta útgerð at tryggja bygningin móti eldi.

**g)** Lyftir og tl.

**h)** Tilfar, sum er lagt á gólv (her íroknað teppi, ið annaðhvørt eru límað føst á undirlag ella løgd á undirlag, ið ikki er at meta sum liðugt gólv).

**i)** Flaggstengur og antennur, sum ikki verða brúktar vinnuliga.

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**Undantøk og avmarkingar**

1. Tryggingin fevnir tó ikki um parabolantennur. Stormtryggingin fevnir ikki um antennur, ið eru festar á skorsteinin.

2. Tryggingin fevnir ikki um skelti og reklamur til vinnuligt endamál.

3. Tryggingin fevnir ikki um listarligt prýði, girðingar, tún, vakstrarhús og høggmyndir.

4. Bert brunatryggingin umfatar glas.

**14.00 Bygningar í gerð**

**14.01** Bygningar í gerð ella undir umbygging og tilbygging eins og tilfar, sum verður goymt á tryggingarstaðnum, ætlað til liðugtgerð av bygningunum.

**14.02** Boðast skal Betri Trygging frá ný-, til- og umbygging, soleiðis at felagið kann taka støðu til, um og undir hvørjum treytum tryggingin kann verða teknað ella halda fram.

## D. Skaðaorsøkir

**Hvørjar skaðaorsøkir fevnir tryggingin um?**

Tryggingin fevnir um beinleiðis skaða á teir tryggjaðu lutirnar, tá skaðin stendst av eini skaðaorsøk, ið tryggingin fevnir um.

Fær ognin skaða, hyggið so eftir í tryggingarskjalinum, um tryggjað er ímóti orsøkini til skaðan.

**20.00 Eldur**

Tryggingin fevnir um skaða av eldi. Við eld er at skilja opin logandi eldur, sum kann breiða seg av sær sjálvum. Sí tryggingaravtalulógina §§ 79-82

**Undantøk og avmarkingar**

1. Endurgjald fæst ikki fyri skaða, ið stendst av, at lutir svíðast ella smelta, og sum ikki er ein fylgja av eldi, til dømis av stikkloga frá el-innleggingum, glóðum frá opnum eldstøðum ella tubbaksneistum og sigarettglóðum.

2. Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri skaða á lutir, sum við vilja útsetast fyri eld ella hita hóast eldur kemur í teir.

**21.00 Tilsóting**

Tryggingin fevnir um skaða, ið stendst av brádligari tilsóting frá útgerð til upphiting, t.d. oljufýrum.

**Undantøk og avmarkingar**

1. Tað er ein treyt, at vegleiðing frá framleiðaranum er fylgd, og at almennar fyriskipanir eru hildnar.

**22.00 Turrkóking**

Tryggingin fevnir um skaða av turrkóking av ketlum, sum nýttir verða til upphiting av rúmum.

**23.00 Eksplosjón**

Tryggingin fevnir um skaða av eksplosjón. Ein eksplosjón er ein sera brádliga fyrigangandi eldur (brenning) ella evna-frøðilig tilgongd, ið elvir nógvan hita, og sum oftast er beint aftaná ein brestur og eitt ljós.

**24.00 Spreinging av dampketlum og trýst kókarum**

Við spreinging er at skilja: Ein brádlig og óætlað útjavning av ymiskum trýsti í og uttanfyri eitt ílat.

**25.00 Beinleiðis toruslátttur**

Tryggingin fevnir um skaða av beinleiðis toruniðurslættri. At toran slær beinleiðis niður skal skiljast soleiðis, at toran hevur sligið niður á tryggingarstaðið. Sí § 12.00.

**Undantøk og avmarkingar**

1. Ein treyt er, at skaði, sum er komin av, at toran sló niður, kann ávísast á ognini.

**26.00 Niðurdottin flogfør**

Tryggingin fevnir um skaðar av niðurdottnum flogførum ella lutum, ið detta niður frá flogførum, annaðhvørt tað er partur av flogfarinum ella lutum, ið flogfarið førir sum last ella ferðagóðs.

**Undantøk og avmarkingar**

1. Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið kemst av spreingievni, ið flogfør føra.

**27.00 Fylgiútreiðslur**

Somuleiðis fevnir tryggingin um skaða, ið stendst av sløkki-vatni, royki og sóti (frá eldi). Sí annars §§ 80.00 og 360.00

**28.00 El-skaði**

28.01 Tryggingin fevnir um skaða á el-innleggingar, íroknað stikkleiðingar og høvuðstalvur, el-húsarhaldstól, so sum køliskap, frystiboks, komfýr, vaski-, turki- og uppvaski-maskina, orku- og ljósinnleggingar, innleggingar til telefon og antennur, orsakaður av skamlopi, induktión, streymvillu, yvirspenningi ella tílíkum.

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**Undantøk og avmarkingar**

**1.** Tryggingin fevnir ikki um skaða sum:

**a)** Kemur undir ábyrgdartrygd, sum sølumenn standa til svars fyri.

**b)** Kemst av skeivari konstruktión, skeivari uppseting, skeivari tilseting og/ella skeivari umvæling.

**c)** Hendir, tá vælt verður um.

**d)** Kemst av sliti, overving ella væntandi viðlíkahaldi.

**e)** Hendir av, at tólið verður skeivt brúkt.

**f)** Er undantikið undir § 20.00.

**2.** Tryggingin fevnir ikki um skaða á aðrar lutir enn teir, sum eru nevndir undir el-skaða.

**28.02** El-skaði verður endurgoldin á henda hátt, roknað eftir nývirði:

Frá tí degi luturin er keyptur sum nýggjur.
Um luturin er:

| | | |
|---|---|---|
| upp til: | 2 ár | 100% |
| | 3 ár | 80% |
| | 4 ár | 70% |
| | 5 ár | 60% |
| | 6 ár | 40% |
| eldri enn | 6 ár | 20% |

**28.03** Útreiðslur fyri umvæling verða endurgoldnar eftir somu reglum.

**30.00 Útstreyming av vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl.**

**30.01** Tryggingin fevnir um skaða av brádliga og tilvildarliga útstreymandi (t.v.s. ikki dryppandi ella spakuliga seyrandi) vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl. úr rørútbúnaði og innleggingum, ið harí eru festar, her íroknað køli- og frystiútbúnaði, somuleiðis frá vatnsengrum, fiskabúrum og øðrum tangum 20 litrar ella meira.

**30.02** Er talan um útstreyming, veitir tryggingarfelagið endurgjald fyri útreiðslur til leiting eftir leka og útreiðslur til afturgerð, um avtala er gjørd við Betri Trygging um hetta frammanundan.

**Undantøk og avmarkingar**

**1.** Tryggingin fevnir ikki um sjálvan tann ótætta lutin.

**2.** Vatnskaði, sum stendst av frostspreinging í rúmum, sum ikki eru nóg væl upphitað, verður bert endurgoldin, um upphitingin av tilvild hevur svikið. Vatnskaði av frost-spreinging av rørum, ið liggja á ovasta lofti, undir væðingini, í krúpikjallarum ella í útveggjum verður bert endurgoldin um rørini eru bjálvaði sambært DS. nr. 432 og 452.

**3.** Hetta er ikki galdandi í hølum, sum tryggingartakarin leigar út, um leigarin hevur skyldina av, at upphitingin svíkur.

**4.** Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum hendir, meðan vatn, olja ella køliløgur verður fylt á ella latið av.

**5.** Tryggingin fevnir ikki um skaða av grund- ella kloakvatni, sum stígur upp, heldur ikki skaða av vatni úr takrennum og rennistokkum frá takrennum, avfalli ella flóð.

**6.** Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið ber á, meðan arbeitt verður uppá innleggingina.

**7.** Tryggingin ímóti skaða av vatni, sum streymar frá nýinn-leggingum, tekur ikki við, fyrr enn rørskipanin er trýstroynd.

**8.** Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at ásetingarnar í *„Kunn-gerð um at fyribyrgja dálking frá oljutangum“* eru fylgdar.

**40.00 Frostspreinging**

**40.01** Tryggingin fevnir um skaða av frostspreinging á niðan fyri nevndu lutir:

Rørútbúnað, ið er ein líður í innandura vatn-, heilsu/reinføris- og frárenningarútbúnaðinum í einum bygningi og wc-kummur, sisternur, handvøsk, bidet og baðikør, miðstøðuhita- og heittvatnsútbúnað somuleiðis ketlar, ið hartil hoyra, tangar, pumpur, mátarar og miðstøðuhitaovnar.

**40.02** Tað verður álagt tryggingartakaranum at syrgja fyri neyðugari upphiting í bygningum, ið ikki verða nýttir, ella at steingja fyri vatninum og at tøma rørútbúnaðin fyri vatn, fyri harvið at fyribyrgja skaða.

**40.03** Tað er tryggingartakarans ábyrgd, at nóg mikið av olju altíð er í tanganum.

**40.04** Fyri at fáa skaðabót fyri vatnskaða orsakað av frostspreinging skal trygging móti skaða av útstreyming av vatni verða teknað.

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**Undantøk og avmarkingar**

1. Tryggingin fevnir ikki um endurgjald fyri skaða av frostspreinging í rúmum, sum eru ov lítið hitað upp, uttan so at atvoldin er, at upp hitingin av tilvild hevur svikið.
2. Hetta er ikki galdandi í hølum, sum tryggingartakarin leigar út, um leigarin hevur skylduna av, at upphitingin svíkur.
3. Tryggingin fevnir ikki um útreiðslur av at tiðna upp.
4. Tryggingin fevnir ikki um skaða á takrennur og rennistokkar.
5. Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum stendst av at rørleiðingar ikki eru bjálvaðar ella ikki eru nóg væl bjálvaðar, sambært almennari byggilóggávu.
6. Tryggingin fevnir ikki um sethús og bygningar, sum standa mannleys.

**50.00 Stormur**

**50.01** Við storm er at skilja vindur, har vindmegin áhaldandi ella í hvirlum er minst 17,2 m/sek.

**50.02** Tryggingin fevnir um brádligar skaðar av stormi og melduródn og skaðar orsakaðir av avfalli í sambandi við ein skaða av hesum.

**50.03** Tryggingin fevnir bert um skaðar av avfalli, um skaðin hevur beinleiðis samband við og hendir beint aftaná, at bygningurin ella yvirbreiðingartilfar, ið er rætt fest, fær stormskaða.

**50.04** Tað er ein treyt, at uttaná bygninginum kann ávísast skaði, sum hendur er av stormi ella melduródn, og at skaðin á tryggjaðu lutirnar kann prógvast at stava fra hesum. Viðvíkjandi antennum, sí § 13.03 i.

**50.05** Fyri bygningar í gerð tekur tryggingin ikki við fyrr enn 3 dagar aftaná, at tryggingarumsóknin er skrivstovuni Betri Trygging í hendi.

**Undantøk og avmarkingar**

1. Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið kemst av vatni úr takrennum og rennistokkum ella avfalli, ið lekur niður gjøgnum tekjuna ella inn ígjøgnum rívur og op.
2. Tryggingin fevnir ikki um skaða á glas ella tilfar, sum verður nýtt í staðin fyri glas.
3. Tryggingin fevnir ikki um skaða av uppgangi, stormflóð, brimi ella flóð.

**60.00 Omanlop, áarlop og glopraregn/toybil**

**60.01** Tryggingin fevnir um skaða av omanlopi. Við omanlop er at skilja: Grót, ið rapar oman úr homrum, líðum og brekkum. Harumframt fevnir tryggingin um skriðulop og skalvalop.

**Undantøk og avmarkingar**

1. Tað er ein treyt, at uttaná bygningunum kann ávísast skaði, sum hendur er av omanlopi, og at skaðin á teir tryggjaðu lutirnar kann prógvast at stava fra hesum.
2. Tryggingin fevnir ikki um skaða á glas ella tilfar, sum verður nýtt ístaðin fyri glas.

**60.02** Tryggingin fevnir um skaða av áarlopi. Við áarlop er at skilja: Tá áir leypa, annaðhvørt orsakað av toybili ella av, at nógv avfall er, og vatn, runa og eyrur rakar ta tryggjaðu ognina.

**Undantøk og avmarkingar**

3. Tryggingin góðgerð ikki skaða, sum stendst av vatni frá veitum, tjørnum og vøtnum.

**60.03** Tryggingin fevnir um skaðar, ið komast á, tá glopraregn er, ella av mesta toybili er, og vatnið ikki á vanligan hátt rennur frá, og tessvegna floymur yvir tryggingarstaðið ella stígur upp ígjøgnum frárenningarrørini.

**Undantøk og avmarkingar**

4. Tryggingin fevnir ikki um skaða av vatni úr takrennum og rennistokkum ella avfalli, sum lekur inn gjøgnum takið ella rivur og op yvir jørðildi.

**70.00 Tjóvarí og herverk**

**70.01** Tryggingin fevnir um bygningsskaða í sambandi við innbrotstjóvarí ella í sambandi við, at roynt verður at gera innbrotstjóvarí úr bygningum ella forsvarliga avlæstum rúmum og herverk í hesum sambandi. Tryggingarhæddin skal vera tilskilað í tryggingarskjalinum.

**70.02** Við innbrotstjóvarí er at skilja, tá ið tjóvurin:

**a)** við makt brýtur sær veg inn í forsvarliga avlæstan bygning ella rúm, ella
**b)** við følskum ella stolnum lyklum læsir seg inn í bygning ella forsvarliga avlæst rúm, ella
**c)** tekur seg inn ígjøgnum op, ið ikki eru ætlað til inngongd.

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**70.03** Tað er ein treyt fyri endurgjald, at hurðar og onnur op eru forsvarliga avlæst, og at vindeyga, burtursæð frá upplating til neyðugt luftskifti, eru afturlatin, og at vindeygu, har undirkarmurin er nærri lendi, trappu, platti, hálvtaki, svala, byggipalli ella tílíkum enn 2 m, skulu vera afturlatin og krampað, tá eingin er inni.

**70.04** Endurgjaldið fyri innbrotstjóvarí og herverk í hesum sambandi kann í ongum føri verða meira enn tann í tryggingarskjalinum avtalaða tryggingarhædd.

**70.05** Talan er um 1. risikotrygging, t.v.s. at undirtrygging verður ikki gjørd galdandi.

**Undantøk og avmarkingar**

1. Tryggingin fevnir ikki um skaða á glas ella tilfar, ið nýtt verður ístaðin fyri glas.

2. Tryggingin fevnir ikki um innbrotstjóvarí úr bygningum, ið hava staðið mannleysir í meira enn 6 mánaðir.

3. Tað er ein treyt, at skaðin verður fráboðaður løgregluni beinavegin, og at kvittan fyri hesa fráboðan verður send Betri Trygging.

## E. Felagstreytir fyri C og D

**80.00 Upprudding**

Tryggingin fevnir um neyðugar útreiðslur til upprudding av teimum tryggjaðu lutunum í sambandi við skaða, sum tryggjað er ímóti. Upprudding og burturbeining av bygningsleivdum, sum sambært skaðauppgerðini ikki kunnu nýtast aftur. Tó bert í tann mun pláss er fyri hesum, í tí í tryggingarskjalinum nevndu tryggingarhædd.

**90.00 Skaðauppgerð**

**90.01** Endurgjaldið skal so vítt sum gjørligt seta tann tryggjaða í somu fíggjarligu støðu, sum hann var í, beint áðrenn skaðin hendi.

**90.02** Áðrenn nakað endurgjald verður goldið, skal skaðin sýnast og virðismetast.

**90.03** Endurgjaldið kann ikki roknast eftir dýrari byggitilfari enn tað skadda ella eftir byggitilfari ella byggihátti, ið ikki vóru vanliga nýtt, tá skaðin hendi.

**90.04** Tá ið ein skaði verður avroknaður, eigur at vera havt fyri eyga, um tann skadda ognin er tryggjað til fult virði, og um so ikki er, verður framfarið sambært tryggingaravtalu-lóguni § 40.

**90.05** Betri Trygging hevur rætt til:

**a)** at yvirtaka ein skaddan lut ímóti at góðgerða virðið, luturin hevði, beint áðrenn skaðin hendi,

**b)** at seta tann skadda lutin aftur í sama stand, hann hevði, beint áðrenn skaðin hendi,

**c)** at fáa til vega tilsvarandi lut sum tann, ið skaddur var.

**90.06** Sí tó § 120.00 um undirtrygging.

**90.07** Endurgjald viðv. el-skaða, sí § 28.00.

**90.08** Endurgjald viðv. innbrotstjóvarí, sí § 70.00.

**90.10** Tryggingarfelagið hevur ikki skyldu til at yvirtaka skaddar lutir.

**Undantøk og avmarkingar**

1. Er tryggingartakarin atvoldin til, at umvælingin verður seinkað, veitir tryggingin ikki endurgjald fyri tann kostnað, sum harav stendst.

2. Endurgjald verður ikki veitt fyri kosmetiskan skaða, og tryggingin fevnir heldur ikki um endurgjald fyri, at nýggir lutir ikki hava sama lit sum teir upprunaligu.

**90.11 Niðurskrivingar**

Fyri niðanfyri nevndu lutir verður niðurskriving gjørd eftir aldrinum á lutinum. Lutir, ið ikki eru nevndir niðanfyri ella í tryggingartreytunum annars, fylgja vegleiðingum frá Forsikring og Pension, sum er okkara vinnugreinafelag.

Niðurskrivað verður bæði fyri tilfar/eykalutir og arbeiðsløn.

**Tekjur av pappi, eternitti og líknandi**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 15 ár | 100% |
| | 20 ár | 80% |
| | 25 ár | 50% |
| og eldri | | 20% |

**Flagtekjur og líknandi**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 20 ár | 100% |
| | 30 ár | 80% |
| | 40 ár | 50% |
| og eldri | | 20% |

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**Takdúkar, klædningur av plastikki og pvc og takrennur. Klædningur samantrýstur úr náttúrurunnum tilfari og líknandi**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 8 ár | 100% |
| | 15 ár | 70% |
| | 20 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Upphitingarútbúnaður, so sum oljufýringar, heittvatns-tangar, ketlar og hitavekslarar (ikki brenniovnar og peisir, somuleiðis rør til gólvhita**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 10 ár | 100% |
| | 15 ár | 70% |
| | 20 ár | 55% |
| | 25 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Hitapumpur**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 3 ár | 100% |
| | 10 ár | 60% |
| | 15 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Harðar hvítvørur, keramiskar- og induktión kókiplátur, el-riknir motorar**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 3 ár | 100% |
| | 10 ár | 70% |
| | 15 ár | 47% |
| og eldri | | 20% |

**Aðrir el-lutir (bert í sambandi við el-skaðar)**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 2 ár | 100% |
| | 3 ár | 80% |
| | 4 ár | 70% |
| | 5 ár | 60% |
| | 6 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Antennur, parabolir**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 3 ár | 100% |
| | 8 ár | 60% |
| | 10 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Føst gólvteppi, herundir teppi, ið eru límaði fast til eitt undirlag ella løgd á eitt undirlag, sum ikki er at meta sum liðugt gólv**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 5 ár | 100% |
| | 8 ár | 60% |
| | 10 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Gólválegging, so sum træ, vinyl, kork, laminat og annað**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 10 ár | 100% |
| | 15 ár | 70% |
| | 20 ár | 60% |
| | 25 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Útbúnaður til at gagnnýta varandi orkukeldur, so sum vindmyllur, sólhita- og jarðhitaskipanir og tilíkt**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 10 ár | 100% |
| | 15 ár | 60% |
| | 20 ár | 30% |
| og eldri | | 20% |

**Vindeygu, úthurðar**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 20 ár | 100% |
| | 30 ár | 60% |
| | 40 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Niðurgrivin leir-, betong- og stoypijarnrør og líknandi**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 20 ár | 100% |
| | 30 ár | 60% |
| | 40 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**Niðurgrivin pvc rør og aðrar rørleiðingar**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 30 ár | 100% |
| | 40 ár | 60% |
| | 60 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**El-leiðingar, ið eru niðurgrivnir í lendi**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 5 ár | 100% |
| | 10 ár | 80% |
| | 20 ár | 60% |
| | 40 ár | 30% |
| og eldri | | 20% |

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**Garaguhurðar**

| | | |
|---|---|---|
| Upp til | 5 ár | 100% |
| | 10 ár | 80% |
| | 15 ár | 60% |
| | 20 ár | 40% |
| og eldri | | 20% |

**100.00 Tryggingarvirði**
**100.01** Tryggingartakarin hevur ábyrgdina av, at tryggingarhæddin er røtt, og er tað hansara ábyrgd at halda tryggingarhæddina viðlíka, so hon er ájøvn við tað, sum byggikostnaðurin hækkar/lækkar.

**100.02** Um meira verður innrættað í bygningunum ella bygt verður afturat, er tað ábyrgd tryggingartakarans at boða Betri Trygging frá hesum og at hækka tryggingarhæddina samsvarandi.

**100.03** Røtt tryggingarhædd er tað, sum tað kostar at byggja tann/teir í tryggingarskjalinum nevndu bygningar aftaná ein totalskaða, íroknað neyðugar útreiðslur til upprudding. Sí §§ 90.00 Skaðauppgerð, 80.00 Upprudding og 13.00 Endurgjald til afturgerð.

**110.00 Yvirtrygging**
Í ongum føri kann verða goldið meira í skaðabót enn tann í tryggingarskjalinum tilskilaða tryggingarhædd, og heldur ikki meira enn tað, ið skaðin veruliga kostar at umvæla, sí tryggingaravtalulógina § 39.

**120.00 Undirtrygging**
**120.01** Um virðið av teim tryggjaðu lutunum er meira enn tryggingarhæddin, er talan um undirtrygging, sí tryggingaravtalulógina § 40.

**120.02** Er virðið t.d. tað dupulta av tryggingarhæddini, ber tað við sær, at ein skaði uppá kr. 50.000 bert verður endurgoldin við kr. 25.000.

**130.00 Endurgjald til afturgerð**
**130.01** Endurgjaldið verður ásett til nývirði, um bygningurin verður upp afturbygdur ella umvældur.

**130.02** Við dagsvirði er at skilja: Byggikostnaðurin við frádrátti fyri virðisminking orsakað av aldri og nýtslu, sí tryggingaravtalulógina § 37, 3. petti.

**130.03** Endurgjaldið verður nýtt til at umvæla ella gera aftur tað skadda eftir sama byggihátti, á somu grund og til sama endamál.

**130.04** Endurgjald til afturgerð verður goldið, tá skaðin er umvældur ella bygningurin er bygdur uppaftur.

**130.05** Vísir tað seg, at útgoldið endurgjald ikki er nýtt til afturgerð av skaðanum sum avtalað, kann Betri Trygging krevja tær soleiðis spardu útreiðslurnar afturgoldnar.

**131.00 Bygningar/bygningslutir ætlaðir at ríva niður**
**131.01** Í teimum førum, tá tað undan einum skaða er avgjørt, at ein bygningur/bygningslutur skal rívast niður, verður endurgjaldið gjørt upp til virðið av tilfarinum, sum er í slíkum bygningi/bygningsluti (dagsvirði) og útreiðslurnar til upprudding. Spardar útreiðslur av, at bygningurin/bygningsluturin ikki varð rivin niður, verða drignar frá.

**131.02** Skuldi bygningurin/bygningsluturin ikki rívast niður beinanvegin, verður hóskandi endurgjald veitt fyri saknin.

**132.00 Bygningar, ið standa mannleysir**
Endurgjald verður ásett við frádrátti fyri aldur og nýtslu, niðursettum nýtsluvirði og aðrar umstøður, sambært tryggingaravtalulógini § 37, 1. petti.

**133.00 Bygging uttan fyri verandi grund**
**133.01** Velur tryggjaði at byggja uttan fyri verandi grund, men á sama tryggingarstað, verða eyka útreiðslurnar av hesum ikki goldnar av Betri Trygging.

**133.02** Verður bygt uttan fyri tryggingarstaðið, verða reglurnar í § 140.00 - Kontant endurgjald nýttar.

**133.03** Neyðug loyvi t.d. byggiloyvi, skulu fyriliggja, áðrenn Betri Trygging viðgerð nevndu krøv.

**140.00 Kontant endurgjald**
**140.01** Verður endurgjaldið ikki nýtt til at seta í stand aftur tað, sum hevur fingið skaða, verður drigið frá fyri virðisminking, sum stendst av aldri og nýtslu, og har afturat verður drigið frá fyri lækkað nýtsluvirði og aðrar umstøður, sí tryggingaravtalulógina § 37, 1.petti.

**140.02** Um partvísur skaði er, verður endurgjaldið roknað eftir, hvussu stórur skaðin er í mun til tað í § 140.01 nevnda virðið.

**140.03** Endurgjaldið verður útgoldið, tá tey, ið rættindi hava í ognini sambært tinglýsingini, geva loyvi til tess.

betri trygging

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**Undantøk og avmarkingar**
1. Endurgjaldið kann í ongum føri verða meira enn handilsvirðið á tí skadda.

2. Um bygningurin er undirtryggjaður, verður endurgjaldið lækkað í sama mun, sambært tryggingaravtalulógini § 40.

## F. Tilvalstryggingar

**Við nærri tilskiling í tryggingarskjalinum kann trygging teknast fyri:**

**150.00 Glastrygging**
**150.01** Tryggingin fevnir um glas ella tilfar, ið nýtt verður í staðin fyri glas, og er innsett sum bygningslutur. Harumframt fevnir tryggingin um innmúrað spegl og keramiskar kókiplátur.

**150.02** Tryggingin fevnir bert um teir tryggjaðu lutirnar, tá teir í heilum líki eru ísettir, har teir eru ætlaðir.

**150.03** Tryggingin veitir endurgjald fyri teir tryggjaðu lutirnar, tá teir eru vorðnir ónýtiligir orsakað av broti, skøvum ella avdottnum splintrum.

**150.04** Endurgjald verður veitt fyri tað, sum tað kostar at skifta teir skaddu lutirnar út við tilsvarandi nýggjar. Er ikki gjørligt at fáa lutir, ið eru sama slag sum teir skaddu, verður goldið eitt kontant endurgjald svarandi til prísin á tilsvarandi lutum, ið vanligir vóru, tá ið skaðin hendi. Útreiðslur til umvæling kunnu ikki vera hægri enn kostnaðurin av, at skifta teir skaddu lutirnar út.

**Undantøk og avmarkingar**
1. Endurgjald verður ikki latið fyri punkteraðar rútar.
2. Tryggingin fevnir ikki um glas ella annað tilfar, ið nýtt er í staðin, í vakstrarhúsum.
3. Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið stendst av umvæling ella umbygging. Tó fevnir tryggingin um skaða, ið hendir undir vanligum viðlíkahaldi, herundir máling av bygningi.
4. Tryggingin fevnir ikki um ornamentir, bókstavar, sandblásing, slíping og tílíkt prýði á rútum.
5. Tryggingin fevnir ikki um fylgiskaðar av glasskaðanum, eitt nú skaða av avfalli.
6. Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri kostnað, ið onnur trygging fevnir um.

## G. Vanligar reglur

**220.00 Tryggingargjald v.m.**
**220.01** Tryggingargjaldið fellur fystu ferð til gjaldingar beinanvegin, tryggingin kemur í gildi, og seinni gjøld teir í tryggingar skjalinum ásettu gjalddagar.

**220.02** Goldið verður á posthúsi, í peningastovni ella á skrivstovu felagsins. Gjaldskrøv verða send til tann av tryggingartakaranum fráboðaða gjaldstað.

**220.03** Ynskist broyting í gjaldskipanini, skal tryggingartakarin beinanvegin geva boð um hetta, eins og tryggingartakarin eigur at boða frá beinanvegin, um hann broytir gjaldstað.

**220.04** Verður tryggingargjaldið ikki goldið, tá ið krav er sent, sendir tryggingarfelagið áminning í fyrsta lagi 14 dagar aftaná.

**220.05** Er tryggingargjaldið ikki goldið í seinasta lagi 14 dagar aftan á áminning, er tryggingarfelagið leyst av ábyrgd, og tryggingartakarin hevur ikki rætt til endurgjald.

**220.06** Tryggingarfelagið skilar sær rætt til at krevja eykakostnaðin av hesum endurgoldnan.

**220.07** Brunatryggingin fyri bygningar kann tó ikki lýsast úr gildi orsakað av, at tryggingargjaldið ikki er goldið, men tryggingarfelagið hevur panti- og útpantingarrætt fyri tryggingargjaldinum og fyri rentur og annan kostnað, sum stendst av hesum.

**221.00 Sjálvábyrgd**
**221.01** Tað er tilskilað í tryggingarskjalinum um tryggingin er teknað við sjálvábyrgd. Eru aðrar sjálvábyrgdir ásettar í hesum treytum ella í tryggingarskjalinum, er hægra sjálvábyrgdin galdandi.

**222.00 Prístalsjavning**
**222.01** Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi 1 prosenti í mun til árið fyri. Prístalsjavningin verður framd høvuðsgjalddagin.

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**222.02** Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.

**230.00 Tíðarskeið og uppsøgn**
230.01 Tryggingin stendur við, til tryggingartakarin ella tryggingarfelagið skrivliga sigur hana upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

**230.02** Tryggingartakarin kann tó bert siga brunatryggingina fyri bygningar upp ella lækka hana um hetta verður gjørt skrivliga við 30 daga freist til mánaðarlok, um so er, at ein og hvør, ið sambært tinglýsingini er rættindahavari í ognini, skrivliga góðkennur uppsøgnina/lækkingina, uttan so at ognin verður tryggjað í øðrum felag, ið hevur rætt at tekna bygningsbrunatrygging, og rættindahavararnir ikki verða verri fyri av hesum.

**230.03** Um bygningarnir ikki eru forsvarliga gjørdir, tá talan er um brunatrygd, ella talan er um bygningar, ið standa mannleysir kann tryggingarfelagið tó lýsa bygningsbrunatryggingina úr gildi beinanvegin og geva veðhavarunum boð um hetta við 14 daga ávaring.

**235.00 Angringarrættur**
**235.01** Tryggingingartakarin kann strika tryggingina frá tekningardegnum, um tryggingarfelagið fær skrivliga fráboðan um tað, áðrenn 14 dagar eru farnir. Hetta merkir, at støðan verður, sum var tryggingin als ikki teknað. Møguligar útreiðslur, sum felagið hevur havt av tryggingini, kunnu krevjast afturgoldnar.

**Undantøk og avmarkingar**
1. Angringarrætturin er ikki galdandi fyri tryggingar, ið eru teknaðar fyri eitt tíðarskeið, ið er ein mánaði ella styttri.

**240.00 Uppsøgn aftaná skaða**
**240.01** Uttan mun til tær í § 230.00 nevndu freistir, hava bæði tryggingarfelagið og tryggingartakarin rætt til at siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um hetta verður gjørt innan 14 dagar eftir, at ein skaði er goldin ella avvístur.

**240.02** Tá talan er um bygningsbrunatrygging, heldur ábyrgd felagsins tó fram til 14 dagar aftaná, at tinglýstir veðhavarar hava fingið boð um hetta.

**250.00 Broytingar av gjaldskránni og tryggingartreytunum**
**250.01** Ger tryggingarfelagið broytingar í gjaldskrá síni, ella tryggingartreytirnar verða broyttar, hevur tryggingarfelagið rætt til við 30 daga freist til mánaðarlok at seta nevndu broytingar í verk.

**250.02** Vil tryggingartakarin ikki góðtaka eina hækking av tryggingargjaldinum ella strangari tryggingartreytir, kann tryggingin sigast upp av báðum pørtum við 14 daga freist.

**260.00 Tá tryggingin verður teknað**
**260.01** Tryggingartakarin hevur ábyrgdina av, at tær í tryggingarskjalinum nevndu upplýsingar eru rættar.

**260.02** Skeivar upplýsingar kunnu, sambært tryggingaravtalulógini §§ 4-10 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur.

**270.00 Vandabroytingar og flyting**
**270.01** Tryggingartakarin skal siga Betri Trygging frá, soleiðis at tryggingarfelagið kann avgera, um ella undir hvørjum treytum tryggingin kann halda fram, tá:

**a)** Farið verður undir at byggja á sama grundøki, at byggja afturat, ella størri umvælingar verða gjørdar (skal altíð verða góðkent av Betri Trygging)
**b)** Bygningarnir skulu nýtast til annað endamál, enn í tryggingarskjalinum tilskilað
**c)** Meira verður innrættað, enn tilskilað er í tryggingarskjalinum
**d)** Bygningarnir fyri ein part ella burturav koma at standa mannleysir ella ónýttir. Við mannleysar ella ónýttar bygningar er at skilja, at eingin sambært landsfólkayvirlitinum býr har fast
**e)** Fastar innleggingar til varandi orku vera gjørdar, t.d. vind orku ella sólorku

**270.02** Verður slíkt ikki fráboðað, kann tað sambært tryggingaravtalulógini §§ 45-50 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur.

**270.03** Tryggingarfelagið hevur, tá ið tað verður kunnugt um nevndu broytingar, rætt til at broyta tryggingartreytirnar og -gjaldið beinanvegin.

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**270.04** Verða bygningarnir ella nýtslan av teimum broytt so nógv, at ábyrgdin gerst so stór, at tryggingarfelagið – um tað visti av hesum frammanundan – ikki hevði góðkent, at ein trygging varð teknað, heldur endurgjaldsskylda felagsins uppat í somu stund, sum broytingin er gjørd.

**270.05** Viðvíkjandi bygningsbrunatrygging heldur ábyrgdin fyri endurgjald tó bert uppat, um so er, at tryggingarfelagið ikki hevði skyldu at tekna trygging fyri hesa ábyrgd. Ábyrgdin mótvegis teimum, ið hava tinglisin rættindi í ognini, heldur tó ikki uppat fyrr enn 14 dagar eftir ávaring.

**280.00 Eigaraskifti**
Viðvíkjandi eigaraskifti, sí § 11.00.

**290.00 Trygdarásetingar**
Eru sett forboð og/ella krøv í tryggingarskjalinum, sum skulu vera hildin ella lokin, áðrenn skaðin hendir, til tess at fyribyrgja ella minka skaðan, og hevur tann tryggjaði ella onnur, ið hava skyldu at ansa eftir, at hesi krøv verða fylgd, ikki syrgt fyri hesum, hevur tann tryggjaði bert krøv móti Betri Trygging, um og tá prógvast kann, at skaðin ikki hendi ella gjørdist størri av tí, at hesi forboð og/ella krøv ikki eru hildin ella lokin.

**300.00 Kríggj, nátturuvanlukkur o.tl.**
**300.01** Tryggingin fevnir ikki um skaða ella útreiðslur av skaða, ið eru ein beinleiðis ella óbeinleiðis fylgja av ella standa í sambandi við:

**a)** kríggj, krígslíknandi viðurskifti, borgarakríggj, hendingar, ið standast av at gera seg inn á uttanveltað, uppreistur ella borgarligan ófrið,
**b)** jarðskjálvta ella aðrar nátturuvanlukkur,
**c)** hendingar, ið standast av atom- og kjarnorkuroyndum av einum og hvørjum slag og/ella geislavirknum burturkasti, annaðhvørt slíkur skaði berst á í friðar- ella krígstíð.

**300.02** Skaði av kjarnorku til vanligt ídnaðarligt, lækna-frøðiligt ella vísindaligt endamál verður tó endurgoldin, um so er, at galdandi fyriskipanir hava verið fylgdar og ikki hava staðið í sambandi við reaktor– ella acceleratorvirksemi.

**310.00 Viðlíkahald v.m.**
**310.01** Um ein skaði fyri tað mesta stendst av, at tryggingar-takarin ikki hevur syrgt fyri neyðugum viðlíkahaldi, kann tryggingin nokta fyri at veita endurgjald.

**310.02** Sama er galdandi, um skaðin fyri tað mesta kemst av, at skeivleikar eru viðvíkjandi projektering, konstruktión, uppseting ella broti á byggisamtyktir, brunalóggávuna, sterk-streymslóggávuna, straffilóggávuna ella aðrar galdandi lógir og reglugerðir.

**310.03** Um Betri Trygging metir, at teir tryggjaðu lutirnir eru í ov vánaligum standi, ella at omanfyri nevndu almennu lógir og fyriskipanir ikki eru fylgdar, kann felagið strika tryggingina ella partar av henni og viðv. brunatryggingini geva veðhavarunum boð um hetta við 14 daga ávaring.

**320.00 Eftirlit**
**320.01** Tryggingarfelagið hevur til eina og hvørja tíð rætt til at sýna teir tryggjaðu lutirnar til tess at meta um ábyrgdina, felagið átekur sær.

**320.02** Vísir eftirlitið, at bygningurin er serliga útsettur fyri ávísar skaðaorsøkir, kann felagið strika tryggingina ella partar av henni og geva veðhavarunum boð um hetta við 14 daga ávaring.

**320.03** Um so er, at tryggjaði noktar Betri Trygging at gera nevnda eftirlit, hevur Betri Trygging rætt til at strika tryggingina og viðv. brunatryggingini geva veðhavarunum boð um hetta við 14 daga ávaring.

**330.00 Skaði, sum tann tryggjaði er atvoldin til við vilja ella í gáloysni**
**330.01** Um tryggjaði við vilja ella av grovum ósketni hevur voldað skaða, kann hann sambært tryggingaravtalulógini §§ 18-19 eftir umstøðunum missa rættin til endurgjald.

**330.02** Sama er galdandi, um skaðin er framdur av hjúna-felaga, ið livir saman við tryggjaða, sí tryggingaravtalulógina § 85.

**330.03** Hevur tryggjaði voldað skaðan av ósketni, ið ikki kann kallast grovt, ella í fyllskapi ella undir ávirkan av rúsandi ella doyvandi evnum, hevur tryggingarfelagið rætt til at avmarka endurgjaldið við upp til 5 %, sí tryggingaravtalulógina § 20.

**340.00 Dupulttrygging**
**340.01** Eru somu lutir og áhugamál tryggjað ímóti sama vanda í øðrum felag, skal boðast Betri Trygging frá hesum, samstundis sum skaðin eisini skal boðast hinum felagnum.

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**340.02** Hevur hitt felagið tikið fyrivarni um, at einki endurgjald verður latið, ella at hetta verður avmarkað, um so er, at trygging er teknað í meira enn einum felagi, eru somu fyrivarni galdandi fyri hesa trygging. Endurgjaldið verður tá at gjalda lutfallsliga av feløgunum.

**350.00 Hvussu verður boðað frá skaða?**
**350.01** Ein og hvør skaði skal beinanvegin skrivliga boðast til tryggingarfelagið. Er talan um innbrotstjóvarí ella herverk, skal samstundis boðast løgregluni frá, og kvittan fyri hesa fráboðan sendast Betri Trygging. Seinking kann hava til fylgju, at endurgjaldið verður avmarkað ella fellur burtur.

**350.02** Fráboðast skal beinleiðis til Betri Trygging.

**350.03** Eingin má fara undir at umvæla ella beina burtur skaddar lutir, uttan fyrst at hava fingið góðkenning um hetta frá tryggingarfelagnum.

**350.04** Hevur tann skaðarakti sett í verk umvælingar ella latið koyra burtur uttan loyvi frá tryggingarfelagnum, er hetta alt fyri hansara egnu rokning.

**360.00 Bjarging og varðveitsla**
**360.01** Hin tryggjaði skal, tá ið skaði er hendur ella ein skaði er um at taka seg upp – eftir besta førimuni – avmarka ella fyri byrgja skaðan.

**360.02** Betri Trygging letur rímiligt endurgjald fyri at seta í verk arbeiði at forða fyri ella avmarka skaða sum omanfyri nevnt.

**370.00 Ósemjur**
**370.01** Eru viðurskifti við felagið, ið tryggingartakarin er ónøgdur við, er hann vælkomin til, í fyrsta umfari, at seta seg í samband við okkum aftur. Vanliga mannagongdin er, at hann setir seg samband við ta deildina, hann er ósamdur við.

**370.02** Talan kann verða um ymisk viðurskifti, t.d. í sambandi við, at trygging verður teknað, í sambandi við eina skaðaavgreiðslu ella onnur viðurskifti við felagið.

**370.03** Kann málið verða loyst á henda hátt, er tað tann besta, mest einfalda og skjótasta loysnin fyri báðar partar.

**370.04** Um semja ikki fæst, eru tríggir møguleikar at fara víðari við málinum, sí 371.00, 372.00 og 373.00

**371.00 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging**
**371.01** Kærast kann til innanhýsis kæruviðgeran hjá Betri Trygging P/F.

**371.02** Kæran skal sendast skrivliga til felagið. Tað skal í skrivinum vera greitt, at talan er um kæru til kæruviðgeran. Kæran kann sendast við vanligum brævi ella við teldubrævi.

**371.03** Í kæruni skal greiðast frá, hvat tað er, sum ósemjan snýr seg um. Tað er ikki neyðugt at leggja tað samskiftið við, sum er fari fram skrivliga við tryggingarfelagið, men nýggj sjónarmið kunnu førast fram í kæruni.

**371.04** Kæran skal, tá talan er um vanligan post, sendast til:

Betri Trygging P/F
Kæruviðgerin
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn
ella við teldubrævi til: betri@trygging.fo
Teldubrævið skal stílast til kæruviðgeran.

**372.00 Kærunevndin**
**372.01** Kærast kann beinleiðis til donsku kærunevndina, uttan fyrst at kæra til innanhýsis kæruviðgeran.

**372.02** Skrivlig kæra - skrivað á donskum - skal sendast kærunevndini, saman við ávísum gjaldi. Um tryggingartakarin, heilt ella partvíst fær viðhald í kæruni, verður gjaldið afturrindað.

**372.03** Á heimasíðuni hjá Ankenævnet for Forsikring er frágreiðing um, hvussu farast skal fram, tá kært verður. Sí: www.ankeforsikring.dk

**372.04** Um ivamál eru viðvíkjandi, hvussu kært verður til Ankenævnet for Forsikring, sendir felagið eftir umbøn oyðublað og faldara hesum viðvíkjandi. Felagið er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

**372.05** Kæran skal sendast til:
Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaardsgade 2
Postbox 360
1572 København V.
Tlf. nr.: 0045 33 15 89 00
Teldupostur: ankeforsikring@ankeforsikring.dk

# Sethúsatrygging – sumtrygging

**373.00 Yvirsýn**
**373.01** Er tvídráttur um skaðauppgerðina, kunnu tryggingartakarin og tryggingarfelagið avtala at lata skaðauppgerðina avgera av óheftum metingarmonnum.

**373.02** Metingarmenninir skulu, áðrenn teir fara til verka, velja ein ástøðumann, sum eisini skal vera óheftur. Koma teir ikki ásamt um ástøðumann, velur Sorinskrivarin hann.

**373.03** Metingarmenninir gera uppgerðina í neyvum samsvari við ásetingarnar í tryggingartreytunum og -skjalinum og gera eina skrivliga frágreiðing um, hvussu teir hava gjørt tapið upp.

**373.04** Yvirsýnið er endaligt og bindandi fyri báðar partar. Koma metingarmenninir ikki ásamt um skaðauppgerðina, er tað ástøðumaðurin, ið innan fyri rammurnar av tí, ið metingarmenninir eru komnir til, skal gera úrskurð í málinum. Avgerð hansara er tá endalig og bindandi fyri báðar partar. Metingarmennirnir avgera somuleiðis, hvussu kostnaðurin av yvirsýninum verður at býta millum partarnar.